Kommunufelagið

Skúlabarnaflutningur

Stuðul verður rindaður sambært § 33 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan. Í kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000 um næmingaflutning er landskassastuðulin ásettur til 50%.

Tað er ein treyt, at talan er um næmingar, sum ikki ganga í skúla í síni egnu bústaðarkommunu.

Undirvísingarstýrið rindar stuðulin sambært uppgerð frá kommununum síðst í fíggjarárinum.

Játtanin í ár er samanlagt góðar 2,2 mió. kr. Játtanin til stuðul á Fíggjarlógini seinastu 6 árini er víst niðanfyri.

(1000 kr.)	2018	2019	2020	2021	2022	J2023
Stuðul á Løgtingsfíggjarlógini	1.831	1.845	2.013	2.161	2.272	2.230

Stuðul í 2022

Niðanfyri verður víst hvørjar kommunur fingu stuðul í 2022. Sum víst fer stuðulin serliga til smærru kommunurnar í Suðuroy, Sandoy og Norðoyggjum.

Kommuna	Stuðul í 2022 (kr.)	Stuðul pr. íbúgva (kr.)
Eystur	332.000	147
Kvívík	329.000	543
Sandoyar Skúlasamband	316.000	251
Hvannasunds	209.000	492
Viðareiðis	209.000	601
Eiði	201.000	250
Sumbiar	132.000	385
Vága	112.000	51
Kunoyar	112.000	747
Hvalbiar	71.000	107
Porkeris	66.000	199
Hovs	66.000	635
Famjins	47.000	595
Sjóvar	41.040	34